


Tórshavnar kommuna søkir eftir einum formanni til eitt arbeiðsmannalið, ið telur 3-4 fólk.

Dentur verður lagdur á evni til at røkja samstarv millum fólk.

**Arbeiðsøkið**
Ymisk sløg av arbeiði, ið verða gjørd við hond, mest røkt av gøtum. Annars kann tað vera alt, ið hoyrir undir Lendisdeildina.

**Vit rokna við, at tú**
ert lagaligur í samvirki við fólki, men dugir kortini at tala beint fram, tá neyðugt er og hevur gott tol.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Umframt grundlønina verður latin formansviðbót.

**Umsókn**
við upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. oktober 2007. Merkið umsóknina „arbeiðsmannaliðið".

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til røktarleiðaran, Jógvan Olsen, ella býargartnaran, Tóra í Hoyvík, tlf. 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**

## Starvslønir
### til listaligt og mentanarligt arbeiði í 2008

Mentanargrunnur Landsins letur umsøkjarum starvsløn við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan

Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár og starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir

Upphæddin í starvslønini svarar til lærarlønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. okt. 2006 er kr. 22.010,74 um mánaðin

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. desember 2007**

**Umsóknarblað** fæst á heimasíðuni ella á skrivstovuni.
**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn. Tlf. 32 08 42 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - www.mentanargrunnur.fo

## Íverksetanarstudningur
### til listafólk í 2008

Mentanargrunnur Landsins letur einum listafólki íverksetanarstudning við støði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningurin skal létta um hjá ávísum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leigu av atelier, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000,- árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. desember 2007.**

**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

## Klaksvíkar Sjúkrahús
700 Klaksvík · Tlf: 45 45 45 · Fax: 45 73 63

**Deild A**
**Kirurgisk songjardeild**

### Sjúkrarøktarfrøðingur

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 0,8 tíð í skiftandi vaktum frá 01.11.07 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**

- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska økið
- Góð samstarvsevnir

Lønar-og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita um starvið frá:**
Anna Løve Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur deild A, tlf. 454545 lokal 511, ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisation og møguligum viðmælum skulu sendast til: Klaksvíkar Sjúkrahús, Umsjónarmaðurin, FO-700 Klaksvík.

**Umsóknarfreist 15.10.2007.**



## Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Undir Klakki 49 til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Matr. nr.** 125f
**Grundøki:** 521 m2
**Húsini:** ca. 140 $m^2$ í einari hædd, tó við bilrúmi í kjallarahædd ca. 25 $m^2$

Hetta eru betonghús, klødd við timbur og takt við tjørupappi. Húsini, sum eru frá 1987, hava urtagarð, eru øll renoveraði og í góðum standi. Útsýnið er gott.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791/222252**